tær bíða eftir artbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum, og tað kann taka forferdiliga langa tíð. Tær ynskja at integrera seg í samfelagið, tær eru fluttar til, men tær sleppa ikki. Og nokk av arbeiði er; tær kundu saktans arbeitt fullan dag við at vaska fyri fólk. Ikki tí fólk vilja útnytta tær, men tí tørvurin er so stórur, staðfestir Petra.

## Glansbílætið er rivnað

Fyri nøkrum áratíggjum síðani var púra vanligt, at húski við fleiri børnum høvdu arbeiðskonu. Hóast bæði kvinnan og maðurin arbeiða úti í dag, liggja húsligu uppgávurnar kortini fyri tað mesta á kvinnuni. Hon skal síggja til at húsið skínur, heimabakað er í ovninum, børnini eru rein og væl uppdrigin, hjúnabandið verður hildið við líka, umframt at hon skal geva karrieruni ans í sínum fulltíðararbeiði.

Men nú er hetta glansbílætið at skrædnað, tí dagsins kvinnur finna seg ikki í hesi tilveruni longur. Hetta hevur havt við sær, at alsamt fleiri húski fáa sær reingeringshjálp, so tær kunnu nýta tíðina til onnur ting. Petra er bert ein av nógvum.

– Eg veit um nógvar familjur, sum hava svarta reingeringshjálp. Og tá eg sigi fólki, at eg havi vaskihjálp, er reaktiónin næstan altíð: “Hvar hevur tú funnið hana, og kann hon eisini koma at gera reint fyri meg?” At tað er svart, tiltalar eisini fólk, tí hitt hevur eingin ráð til, sigur Petra. Hon sigur víðari, at summi orka ikki tankan um, at nakar skal koma inn og síggja teirra órudd. Men tey gerast alsamt færri.

Spurd, um hon nakrantíð fær niðrandi reaktiónir, tá hon greiðir frá um sína vaskihjálp, svarar hon, at tað hevur hon ongantíð fingið.

– Eg væntaði faktiskt, at fólk fóru at halda, at eg eri ein dovin og vánalig kona, sum ikki klári at halda heimið pent og reint. Men eg haldi, at tað fyri tað mesta er í mínum egna høvdi, at teir fordómarnir eru. Tí sjálvandi hevði eg viljað verið ein av hesum superkvinnunum, sum klára at halda glansbílætinum inntakt. Men eg eri komin til ta niðurstøðu, at eg klári ikki alt, og at viðganga tað var ein stórur lætti, sigur Petra.

Hon heldur, at tær umleið 1000 krónurnar um mánaðin eru væl givnar út.

– Við at lata kvinnuni hesar pengarnar fyri reingerð, keypi eg meg frá stressinum av einum óruddiligum húsi, eg keypi mær sjálvari betri lag og meiri yvirskot, og týdningarmest av øllum: eg keypi mær tíð saman við børnunum, staðfestir Petra.

*Petra er dulnevni. Blaðstjórnin kennir rætta navnið á Petru.*

bleiv heilt ovfarin, tí tað var eg ikki von við. So eg kenni meg meiri sum eitt vinfólk, sum rættir eina hjálpandi hond, heldur enn at tey eru mínir arbeiðsgevarar. Og eg føli, at tey seta stóran prís uppá meg, sjálvt um eg “bara” eri vaskihjálpin, greiðir Maria frá.

## Føroyskar kvinnur ikki dovnar

Tá eg spyrji Mariu, hvat hon heldur um, at føroyskar kvinnur ikki klára ella tíma at halda heimið reint og ruddligt svarar hon, at tað skilir hon væl.

– Føroyskar kvinnur eru karrierukvinnur. Tit arbeiða nógv og hava altíð nógv um oyruni. Harafturat skal familjan passast. Tað er ikki nógv frítíð, og eg skilji væl, at tit ikki tíma at nýta frítíðina uppá at gera reint. Eg hugsi absolut einki negativt um tær kvinnur, sum ringja til mín og ynskja mína hjálp, slær Maria fast.

Og hon kennir tað ikki sum, at hon verður útnyttað.

– Eg eri sera glað fyri hetta arbeiðið. Fyri tað fyrsta tí tað gevur mær nakað at fara upp til, og tí eg geri ein mun. Men so sanniliga eisini fyri at fáa eitt sindur av lummapengum. Vit eru jú tvey fólk heima, men bert ein inntøka, tí eg havi ikki loyvi at tjena nakað. Alt skal gjaldast við inntøkuni hjá manninum, so tað eru ikki nógvir pengar til avlops.

– Og tað er eisini irriterandi, at eg altíð má biðja hann um pengar, um eg havi hug at keypa mær okkurt. Eg kenni meg sum ein snúltara, sum altíð má biðja um pengar. Eg havi altíð arbeitt nógv og tjent væl, men nú havi eg ikki havt loyvi at tjena nakað í langa tíð. Tað er ein keðilig støða, sigur Maria.

Hon sigur at enda, at tá hon vónandi fær loyvi at arbeiða í Føroyum, ætlar hon sær at halda fram við vaskiarbeiði.

– Mær dámar tað væl, og eg veit, at tað er ein stórur tørvur, sigur Maria.

*Maria er dulnevni. Blaðstjórnin kennir rætta navnið á Mariu.*



*Rákið við at fáa sær vaskihjálp heima við hús vindur alsamt uppá seg. Fyri tað mesta eru tað svartir pengar, sum skifta hendur, tá føroyskar kvinnur ikki megna ella tíma at gera reint heima. Og fleiri av vaskihjálpunum eru útkendskar kvinnur, sum eru fluttar til Føroya*
*Mynd: Sunva Eysturoy Lassen*